LM-101/2025

# Uttanríkis- og fiskimálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 05-05-2026 |
| Mál nr.: | 25/26371-36 |
| Málsviðgjørt: | BL/JHT/KJ |
| Ummælistíð: | 19/11-2025 – 5/1-2026 og 24/4– 27/4 2026 |
| Eftirkannað: | 25.04.2026 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)**
(Longd gildistíð, nágreina ella fáa heimildir til at skipa fiskiskapin, at boða frá útluting, at sýta útlendskum skipum at taka ímóti vørum, veitingum og at umskipa o.tíl., at avhenda rættindi at fiska av felagskvotu, at geva undantak frá at landa í Føroyum við fráboðan o.a.)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 209 frá 15. desember 2025, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 7, stk. 1, 1. pkt. og stk. 2 verður "1. januar 2034" broytt til: "1. januar 2037".

**2.** § 7, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Áðrenn 20. februar á øðrum hvørjum ári leggur landsstýrisfólkið fyri Løgtingið frágreiðing sambært § 51, stk. 4 í Tingskipan Løgtingsins um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir landsstýrisfólkið hevur í hyggju at fremja."

**3.** § 22, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Landsstýrisfólkið kann skipa fiskiskapin í føroyskum sjógvi, undir hesum m.a. áseta skipan, býti og treytir um fiskiskapin. Kvotunøgdir, undir hesum ásettar føroyskar kvotur, heildarkvotur, felags árskvotur, umframt fiskidagatal o.tíl. kunnu kunngerast við eini fráboðan."

**4.** § 22, stk. 2 verður strikað.

**5.** § 26 verður strikað, og í staðin verður sett:

"**§ 26.** Bannað er førum undir fremmandum flaggi at umskipa o.tíl. í føroyskum sjógvi og í føroyskum havnum uttan loyvi frá landsstýrisfólkinum. Harumframt er teimum bannað at taka ímóti vørum og tænastuveitingum, sum stuðla undir, at fiskiskapur kann fara fram.
*Stk. 2.* Landsstýrisfólkið kann loyva førum undir fremmandum flaggi at

umskipa o.tíl. í føroyskum sjógvi og í føroyskum havnum, og at tey taka ímóti vørum og tænastuveitingum sambært stk. 1. Harumframt kann landsstýrisfólkið áseta nærri treytir hesum viðvíkjandi.
*Stk. 3.* Landsstýrisfólkið kann sýta loyvi eftir stk. 2, um ikki er fiskað í samsvari við semjur í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum um at gagnnýta og verja sjófeingi, sum Føroyar hava tikið undir við."

**6.** Aftan á § 31, men áðrenn yvirskriftina yvir § 32, verður sett:

"*Avhending av rættindum til felags árskvotur og felags fiskidagar*

**§ 31 a.** Rættindi til fiskiskap við føroyskum fiskiførum uttan fyri føroyskan sjógv, sum eru skipað við felags árskvotu ella felags fiskidøgum, kunnu avhendast øðrum fiskifari við veiðiloyvi fyri eitt fiskiár í senn. Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um at avhenda rættindi."

**7.** Í § 34, stk. 2, 1. pkt. verður "at" strikað.

**8.** § 34, stk. 2, nr. 3 verður orðað soleiðis:
"3) Treytir um innviging og skyldu at skráseta og goyma upplýsingar í samband við innviging. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, nær Fiskiveiðieftirlitið kann áseta treytir og skyldur í samband við innviging, og at innvigingarskipanir o.a. skulu góðkennast av Fiskiveiðieftirlitinum."

**9.** § 34, stk. 2, nr. 6 verður orðað soleiðis:
"6) Treytir um innrætting og útbúnað umborð og krav um, at skip skal hava góðkendar tekningar av skipinum og útbúnaði umborð."

**10.** § 37, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Tað er bannað at blaka ella sleppa veiðu útaftur."

**11.** Í § 41 a verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 3.* Landsstýrisfólkið kann við eini fráboðan kunngera bráðfeingis undantak frá markinum í stk. 1 at landa og avreiða uttanlands fyri ávíst fiskaslag. Undantakið kann í mesta lagi vera 14 dagar hvørja ferð."
Stk. 3 og 4 verða eftir hetta stk. 4 og 5.

**12.** Heitið á kapitli 13 verður orðað soleiðis:

"**Avgreiðsla og avgreiðslugjøld**"

**13.** Aftan á § 52 verður í kapittul 13 sett:

"**§ 52 a.** Fiskiveiðieftirlitið kann krevja, at avgreiðsla og gjald fyri avgreiðslu av loyvum og váttanum sambært løgtingslógini skal vera talgild, og at oyðublað verður nýtt.
*Stk. 2.* Tá serligar umstøður tala fyri tí, skal undantak gevast frá kravinum um brúk av talgildari viðgerð.
*Stk. 3.* Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, hvussu avgreiðsla og gjald fyri avgreiðslu fer fram."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

Lógaruppskotið verður lagt fram, tí tørvur er á at nágreina, tillaga og broyta hesar ásetingar í lógini:

- § 7, stk. 1 og 2: Gildistíðin á veiðiloyvum og rættindum verður longd til 1. januar 2037, soleiðis at gildistíðin verður 10 ár roknað frá 1. januar 2027.

- § 7, stk. 4: Mett verður ikki neyðugt at leggja frágreiðing fyri Løgtingið á hvørjum ári, sum ásett í § 7, stk. 4, og tørvur er tí á at broyta ásetingina. Broytingarnar í fiskiveiðuni eru ikki nóg nógvar frá ári til ár, og viðgerðin verður tí í høvuðsheitum um tað sama hvørt ár, uttan at nakað nýtt er, sum er av nóg stórum týdningi til eina frágreiðing og viðgerð í Løgtinginum.

- § 22, stk. 1 og 2: Staðfest er, at stk. 1 ikki er heimildin at skipa fiskiskapin á Føroyabanka. Heimildin er bert í stk. 2. Hinvegin er eingin orsøk til at hava serstaka heimild til at skipa Føroyabanka, og hetta hevur við sær óneyðug ivamál um markamótið millum heimildirnar í § 22. Tørvur er tí á at strika § 22, stk. 2 og at tillaga stk. 1, so heimildargrundarlagið verður einfaldari og sostatt nøktandi grundarlag at skipa fiskiskapin á Føroyabanka frameftir. Harafturat er tørvur á eini smidligari og meiri effektivari umsiting og at fáa heimild til, í ávísum førum, at boða frá ásettum kvotum (nøgdum) og fiskidøgum við eini fráboðan heldur enn í kunngerð.

- § 26: Tørvur er á at víðka ásetingina, soleiðis at heimild er at banna førum undir fremmandum flaggi at taka ímóti vørum og tænastuveitingum, sum stuðla undir fiskiskapi. Tørvur er harumframt á eini nýggjari áseting, sum forðar fyri, at før undir fremmandum flaggi, sum fiska av hóttum fiskastovnum, í ósamsvari við semjur í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum, sum Føroyar hava tikið undir við, fáa atgongd til føroyskan sjógv og føroyskar havnir.

- § 31 a: Eftir verandi lóg ber til at flyta ella avhenda egnar kvotur og egnar fiskidagar. Veiðirættindi kunnu eisini flytast millum fiskifør, tá veiðiloyvi verða flutt. Skal skipanin vera smidlig, eigur tað eisini at vera møguligt hjá vinnuni at flyta rættindi at fiska av felagskvotum ella felags fiskidøgum, uttan fyri føroyskan sjógv, millum skip og rættindahavarar fyri eitt fiskiár.

- § 34: Í november 2022 undirritaðu Føroyar, Bretland, ES, Grønland, Ísland og Noreg nýggja avtalu um eftirlit við fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski, sum áleggur nýggj og víðkað krøv til eftirlit, viging, fráboðanir og útgerð. Nógvar av hesum ásetingum eru ikki fevndar av heimildunum í verandi lóg. Tí er neyðugt at víðka heimildirnar at áseta reglur í kunngerð sambært § 34, stk. 2.

- § 37, stk. 1: Tørvur er á at umorða ásetingina um bannið at blaka veiðu út, so hon er neyvari og greiðari og fatar um øll sløg av fiskiskapi, sum er skipaður eftir lógini.

- § 41 a: Á hvørjum ári hevur verið neyðugt at geva undantak í kunngerð frá kravinum um at landa og avreiða í Føroyum, m.a. í svartkjaftafiskiskapi. Tá móttøkuorkan í Føroyum er avmarkað, ber ikki til at avreiða alt innan hóskandi tíð, og tí verður givið undantak til at landa uttanlands. Hetta hevur tó ofta elvt til bíðitíð og vanda fyri

virðismissi, og undantøkini hava verið gjørd fyri longri tíðarskeið enn neyðugt. Tí er neyðugt at fáa heimild til at geva bráðfeingis undantak í ávísum førum.

- § 52 a: Tørvur er á heimildum at krevja, at avgreiðsla av loyvum o.ø. kann fara fram talgilt, og at gjaldið fyri hesar avgreiðslur eisini kann fara fram talgilt.

## 1.2. Galdandi lóggáva

*§ 7, stk. 1 og 2 – Longd gildistíð*
Sambært § 7, stk. 1 í galdandi lóg eru veiðiloyvini galdandi til 1. januar 2034, og tá hesi fara úr gildi, fara samstundis øll veiðirættindini úr gildi.
Sambært stk. 2 í somu áseting er rætturin til fiskiloyvi í bólki 5 og rætturin til onnur fiskiloyvi hjá fiskifari í hesum bólki galdandi til 1. januar 2034.

*§ 7, stk. 4 - Frágreiðing fyri Løgtingið*
Sambært galdandi § 7, stk. 4 í sjófeingislógini skal landsstýrismaðurin á hvørjum ári, áðrenn 20. februar, leggja fyri Løgtingið frágreiðing sambært § 51, stk. 4 í Tingskipan Løgtingsins um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja. Frágreiðingin var fyrstu ferð løgd fram í 2021.

Ásetingin í § 7, stk. 4 er framhald av § 21, stk. 3 í fyrrverandi løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, sum eisini ásetti skyldu hjá landsstýrismanninum at leggja frágreiðing fyri Løgtingið sambært § 51, stk. 4 í Tingskipanini. Munurin var, at freistin tá var 1. oktober.

Endamálið við frágreiðingini er at viðgera gongdina og støðuna í fiskivinnuni á sjógvi og á landi og væntanir til framtíðarútlit, at viðgera búskaparlig, samfelagslig og lívfrøðilig viðurskifti av týdningi fyri fiskivinnuna, og at viðgera altjóða avtalur, nýggja lóggávu og framtíðar ætlanir.

Frágreiðing hevur nú verið løgd fram á hvørjum ári síðani 2018, burtursæð frá 2020, tá sjófeingislógin tók við.

*§ 22, stk. 1 og 2 - Heimild til at skipa fiskiskapin og at lýsa kvotunøgdir við eini fráboðan*
Eftir galdandi lóg kann landsstýrisfólkið sambært § 22, stk. 1 í sjófeingislógini áseta kvotuskipan, fiskidagaskipan ella aðra skipan fyri fiskiskapin í føroyskum sjógvi. Harumframt kann landsstýrisfólkið áseta reglur um atgongd, býti av tøkum fiskimøguleikum, og hvussu fiskiskapurin annars skal fara fram.

Sambært galdandi § 22, stk. 2 í sjófeingislógini hevur landsstýrisfólkið serliga heimild til at skipa fiskiskapin eftir botnfiski og øðrum djórasløgum á Føroyabanka og at áseta reglur um, hvørjir bólkar av fiskiførum og veiðihættir kunnu vera partar av skipanini.

*§ 26, stk. 1-3 - Heimild til at banna førum undir fremmandum flaggi at m.a. umskipa í føroyskum sjógvi og havnum*
Galdandi § 26 er framhald av § 37 í løgtingslóg nr. 161 um fyrisiting av sjófeingi frá 2017, sum er framhald av § 10 í løgtingslóg nr. 28 um vinnuligan fiskiskap frá 1994.

Galdandi § 26, stk. 1 bannar sum meginregla útlendskum skipum at fremja ymiskt virksemi, sum hevur samband við fiskiskap í føroyskum sjógvi og havnum.

Talan er um virksemi, so sum at umskipa veiðu, uppskipa veiðu, virka, pakka ella á annan hátt handfara veiðu ella úrdrátt úr veiðu, umskipa útgerð ella ankra upp við tí í hyggju at taka lut í umskiping av veiðu ella taka inn útgerð o.tíl.

Sambært galdandi § 26, stk. 2 kann landsstýrisfólkið tó geva undantak frá hesum banni og áseta nærri treytir hesum viðvíkjandi.

Undantak kann sambært lógartekstinum gevast til at umskipa veiðu o.a. bæði í føroyskum sjógvi og í føroyskum havnum. Tá grundarlagið fyri banninum í § 26, stk. 1 má metast at vera eitt atlit at hava nøktandi eftirlit, er tað eisini atlitið at eftirlitinum, sum er avgerandi fyri, um undantak kann gevast, og um ásetingin hevur verið umsitin í samsvari við hetta.

Siðvenja er fyri at lata skipum eitt "standandi loyvi" til umskipingar. Sostatt er ikki ein ítøkilig avgerð tikin av landsstýrisfólkinum fyri hvørja ætlaða umskiping.

Vísandi til viðmerkingarnar til § 10 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap frá 1994 hava umskipingar, serliga hjá russiskum skipum, verið loyvdar í fleiri áratíggju.

Síðani 2014 eru ásetingar, sum loyva umskipingum í føroyskum havnum, settar beinleiðis í tær kunngerðir, sum skipa fiskiskapin hjá fremmandum skipum í føroyskum sjógvi.

Orðingar hesum viðvíkjandi eru í øllum kunngerðum fyri fremmand skip í føroyskum sjógvi (norsk, grønlendsk, bretsk og íslendsk). Lagt verður upp til í kunngerðunum, at Vørn kann loyva umskiping í føroyskari havn, men við teirri treyt, at hetta verður gjørt samsvarandi NEAFC-reglum. Talan er her um eftirlit, m.a. um treytir um fráboðanir, áðrenn komið verður í havn, fráboðanir um veiðu umborð og t.d. eisini eitt krav um, at umskipingin bert kann fara fram til skip frá einum NEAFC-sáttmálaparti ella einum NEAFC-samstarvslandi. Við støði í hesum hevur Vørn loyvt umskipingum í føroyskum havnum, tá NEAFC-treytirnar eru loknar.

Tørvurin á nøktandi eftirliti er sostatt, sum útgangsstøði, mettur at vera einasta sakliga grundgevingin fyri ikki at geva undantak eftir § 26 í dag.

Mett verður, at tørvur er á at víðka ásetingina soleiðis, at heimild er at banna førum undir fremmandum flaggi at taka ímóti vørum og tænastuveitingum, sum stuðla undir fiskiskapi. Harumframt er, í sambandi við at geva undantak, tørvur eisini á at taka atlit at stovnsrøkt soleiðis, at útlendsk skip, sum hava veiðu, ið ikki er fiskað í samsvari við semjur í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum um fiskiskap, sum Føroyar hava tikið undir við, ikki kunnu koma í føroyskan sjógv ella í føroyskar havnir at umskipa o.tíl. Tað vil siga virksemi, ið ikki beinleiðis kemur undir ÓÓÓ-fiskiskap sambært § 27.

*§ 31 a - Avhending av rættindum til felags árskvotur og felags fiskidagar*
Eftir galdandi lóg um sjófeingi er loyvt at flyta fiskimøguleikar millum skip við at flyta eitt veiðiloyvi á annað fiskifar við veiðiloyvi ella á fiskifar við ongum veiðiloyvi (§ 28).

Veiðiloyvið er allýst sum tann rættur, ið landsstýrisfólkið veitir eigara av ávísum fiskifari at reka vinnuligan fiskiskap við fiskifarinum. Hendan heimildin verður brúkt, tá fiskifør verða

skift út ella í sambandi við samanlegging av rættindum hjá tveimum ella fleiri skipum. Tá veiðiloyvi verður flutt, fylgja øll fiskiloyvi við. Eisini er eftir lógini loyvt at avhenda egnar fiskidagar (§ 30) ella egna árskvotu (§ 31) fyri eitt ár í senn ella endaliga.

Tørvur er á eini heimild, sum loyvir at flyta rættindi at fiska av felagskvotum ella felags fiskidøgum, sum Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv. Við hesum fær vinnan rúmari ræsur at leggja fiskiskapin skynsamt til rættis, eins og tað stuðlar undir, at Føroyar sum mest gagnnýta tøkar fiskimøguleikar. Dømi er um, at í fiskiskapinum eftir kongafiski í altjóða sjógvi norðanfyri, sum er skipaður við felagskvotu, ber undir verandi reglum ikki til hjá skipaeigara at flyta sítt fiskiloyvi á annað skip hjá sær, hóast alt talaði fyri, at tað rakstrarliga var skynsamt, samstundis sum tað hevði stuðlað undir, at Føroyar gagnnýttu sum mest av tøkum fiskimøguleikum aðrastaðni.

*§ 34, stk. 2, 1. pkt., nr. 3 og 6 - Víðka heimildir til at áseta í kunngerð tað, sum er samtykt við grannalondini um eftirlit við fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski og aðrar tillagingar*
§ 34 í sjófeingislógini gevur landsstýrisfólkinum heimild til at áseta nærri reglur um fiskiskapin og umsitingina av stovnunum, undir hesum friðingar, minstamát og veiðihættir (stk. 1), og at áleggja teimum, ið fiska, reglur um handfaring av veiðu, skráseting, útgerð, innviging og eygleiðarar (stk. 2). Harumframt kann landsstýrisfólkið áseta reglur um elektroniskt samskifti (stk. 3), flyting av kvotum millum ár (stk. 4–6) og fiskiskap á landi og í áum o.tíl. (stk. 7).
Viðvíkjandi teimum broytingum, sum skulu gerast, er tað stk. 2, sum er viðkomandi at hyggja at.

Sambært § 34, stk. 2 kann landsstýrisfólkið áseta nærri reglur um ymisk viðurskifti, sum áleggja teimum skyldur, ið fiska, taka ímóti, umskipa, flyta, leggja upp, goyma, virka og selja fisk og fiskaúrdrátt. Ásetingin fevnir yvirskipað um reglur, sum hava at gera við handfaring av veiðu, skrásetingar og fráboðanir, eftirlit og útgerð. Sambært ásetingini kunnu t.d. gerast reglur um skyldu at føra veiðidagbók, at lata inn dagbøkur, vektarseðlar og aðrar upplýsingar, at landa um innvigingarskipan, at hava eygleiðara umborð, og um útgerð til samskifti og skráseting o.s.fr.

§ 34, stk. 2, nr. 3 fevnir um at seta treytir um innvigingarskipan, og nr. 6 fevnir um treytir um innrætting og útbúnað í samband við eitt nú hagreiðing av veiðu, og ásetingin snýr seg eisini um krøv um tekningar av lastarrúmi og skipinum annars.

*§ 37, stk. 1 - Bann at blaka veiðu út*
Bann fyri at blaka veiðu út hevur í nógv ár verið ein grundregla í føroysku fiskiveiðilóggávuni. Bannið var fyrstu ferð sett í lógina í 1994 við tí endamáli at tryggja, at ikki meira verður veitt burtur úr fiskastovnunum enn tað, sum er lívfrøðiliga forsvarligt.

Eftir galdandi sjófeingislóg er bannað *at blaka veiðu fyri borð*. Landsstýrisfólkið hevur heimild til at geva undantak frá banninum.

Verandi orðing er ikki nøktandi fyri umsiting av økinum. Hon fevnir í grundini bert um veiðu, sum er fingin umborð á fiskifar. Eftir hesum er t.d. sonevnd slepping ikki fevnd av banninum. Slepping er, tá veiða verður slept út aftur úr reiðskapi, uttan at veiðan er tikin umborð. Orðingin fevnir heldur ikki um fiskiskap frá landi, í áum, vøtnum, ósum og løkum.

Ætlanin við broytingini er at gera ásetingina greiðari og neyvari, so útblakingarbannið fevnir um allan fiskiskap, ið er skipaður við heimild í lógini.

Nýggja orðingin í stk. 1 hevur eisini týdning fyri at umsita heimildina at geva undantak í stk. 2. Tað eigur at vera greitt, hvat tað er, ein gevur undantak frá. Í sambandi við undantøk kann nevnast, at í verandi reglum eru longu reglur, sum áseta skyldu at seta veiðu útaftur. Til dømis skal hummari, sum er undir ásett minstamát, og hummari við rognum, sleppast útaftur. Annað dømi er skyldan at seta sjósíl, sum eru undir minstamát, útaftur.

*§ 41 a - Landing uttanlands av uppsjóvarfiski*
Sambært § 41 a í sjófeingislógini er loyvt føroyskum skipum at landa og avreiða í mesta lagi 25 prosent av veiðuni av makreli, svartkjafti ella norðhavssild uttanlands.

Landsstýrisfólkið hevur heimild til at geva undantak frá hesum marki í kunngerð ella sambært umsókn. Hendan heimildin hevur verið brúkt í støðum, har móttøkuorkan í Føroyum ikki klárar at fylgja við veiðuni. Undantak hevur serliga verið givið fyri svartkjaft vegna vantandi móttøkuorku í Føroyum í vertíðini. Hetta verður gjørt fyri, at skip skulu sleppa undan at bíða ov leingi eftir landingartørni og tí virðistapi, tað kann hava.

Eftir verandi lóggávu verður undantak frá avmarkingini fyri at landa uttanlands lýst í kunngerð. Henda mannagongd er umsitingarliga tung. Ofta gongur ov long tíð frá tí, fløskuhálsurin í móttøkuorkuni er staðfestur, til undantakið verður lýst. Tørvur er á eini heimild, so at fyrisitingin við styttri skotbrái kann lýsa undantakið.

*§ 52 a - Talgild viðgerð og gjald fyri avgreiðslur*
Tørvur er á nýggjari heimild, so Fiskiveiðieftirlitið kann krevja, at øll viðgerð í samband við avgreiðslu av loyvum o.ø. verður talgild, og at upplýsingar skulu skrásetast og sendast myndugleikunum talgilt. Í praksis snýr hetta seg í størstan mun um, at allar fráboðanir skulu sendast myndugleikunum talgilt. Harumframt kann landsstýrisfólkið áseta nærri reglur um, hvussu avgreiðsla og gjald fyri avgreiðslu í hesum sambandi fer fram.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

*§ 7, stk. 1 og 2 – Longd gildistíð*
Undanfarna samgonga hevur ikki longt gildistíðina á veiðiloyvum og rættindum.

Veiðiloyvir og rættindi hava gildi til 1. januar 2034 sambært núgaldandi lóg, tað vil siga, at gildistíðin er umleið 7,5 ár í løtuni.

Endamálið við hesum uppskoti er at broyta gildistíðina til 1. januar 2037. Gildistíðin verður sostatt longd, og frá 1. januar 2027 verður gildistíðin 10 ár.

*§ 7, stk. 4 - Frágreiðing fyri Løgtingið*
Broytingarnar í fiskiveiðuni eru ikki nóg nógvar frá ári til ár, og viðgerðin verður tí í høvuðsheitum um tað sama hvørt ár, uttan at nakað nýtt er, sum er av nóg stórum týdningi til eina frágreiðing og viðgerð í Løgtinginum.

Ætlanin er tí at broyta ásetingina soleiðis, at frágreiðingin verður løgd fram annaðhvørt ár, ístaðin fyri hvørt ár.

Endamálið við broytingini er at tryggja, at frágreiðingin og politiska viðgerðin av henni fær størri tyngd og raðfesting.

Mett verður, at tað er bæði politiskt og umsitingarliga hóskandi at lata frágreiðing annaðhvørt ár, so tilfar og viðgerð kunnu gerast meiri viðkomandi og týðandi til hesa frágreiðing og viðgerð.

*§ 22, stk. 1 og 2 - Heimild til at skipa fiskiskapin og at lýsa kvotunøgdir við eini fráboðan*
Í sambandi við ítøkiligt mál, sum hevur verið viðgjørt hjá Løgtingsins umboðsmanni og í umsitingini í Fiskimálaráðnum, eru staðfest ivamál viðvíkjandi heimildini at skipa fiskiskapin á Føroyabanka sambært § 22.

Í niðurstøðu hjá Løgtingsins umboðsmanni frá november 2024 varð staðfest, at heimildin at skipa fiskiskapin á Føroyabanka einans er í § 22, stk. 2 og ikki í stk. 1, sum Ráðið annars metti, grundað á eina heildarmeting av lógargrundarlagnum. Niðurstøðan hjá Umboðsmanninum er ein beinleiðis avmarking av heimildini í stk. 1 við “lex specialis”-áskoðan, sum staðfestir, at greiðari markamót eru neyðug. Hinvegin er eisini óneyðugt at hava eina heimild til at skipa fiskiskapin í føroyskum sjógvi og eina aðra heimild til at skipa fiskiskapin á Føroyabanka, sum er partur av føroyskum sjógvi.

Ætlanin er tí at strika § 22, stk. 2 og tillaga stk. 1 soleiðis, at heimildin verður samanhangandi og nóg breið og fevnir um at skipa allar tættir í fiskiskapinum í føroyskum sjógvi, undir hesum veiða eftir botnfiski á Føroyabanka.

Endamálið við broytingini er at gera heimildargrundarlagið í § 22 greiðari og einfaldari.

Harafturat er tørvur á eini smidligari og meiri effektivari umsiting, og at fáa heimild til í ávísum førum at lýsa kvotunøgdir, undir hesum ásettar kvotur, felags árskvotur (felags kvotupartar roknaðir um til tons), fiskidagar o.tíl. við eini fráboðan heldur enn í kunngerð.

Í dag verður ein kunngerð gjørd, tá ið fiskiskapurin verður skipaður sambært ásetingini. Allar upplýsingar um býtið og kvotunøgdir verða eisini gjørdar í kunngerð. Hesin háttur hevur við sær, at nógvar kunngerðir eru, sum skulu broytast á hvørjum ári og eisini í fiskiárinum, tá tillagingar skulu gerast í kvotunøgdum av ymiskum orsøkum.

Ætlanin er at seta inn eina heimild til at lýsa ásettar kvotur, felags árskvotur o.tíl. at útluta við eini fráboðan. Heimildin fevnir eisini um fiskidagar sambært hesi áseting. Endamálið er at skapa eina smidligari og effektivari fyrisiting.

Ein fráboðan kann ikki brúkast til at skipa fiskiskapin ella til at áseta reglur um skipan, býti o.s.fr. Fráboðanin kann einans brúkast til at upplýsa um kvotunøgdir, fiskidagatal og aðrar upplýsingar, sum eru skipaðar innan fyri karmar í kunngerðum.

Sambært § 2, stk. 1 í løgtingslóg um kunngerðablað skulu kunngerðir og aðrar almennar fyriskipanir, givnar av landsstýrinum, lýsast í Kunngerðablaðnum. Fráboðanir sambært § 22 verða lýstar í Kunngerðablaðnum samsvarandi hesi áseting. Heimildin er sostatt ikki ætlað sum eitt frávik frá kunngerðarkravinum.

*§ 26, stk. 1-3 - Heimild til at banna førum undir fremmandum flaggi at m.a. umskipa í føroyskum sjógvi og havnum*
Endamálið við uppskotinum er at fáa heimild til at banna førum undir fremmandum flaggi at taka ímóti vøru og tænastuveitingum, sum stuðla undir fiskiskapi. Endamálið er eisini at fáa nøktandi heimild til at sýta loyvi til umskiping o.tíl. í føroyskum sjógvi og í føroyskum havnum, tá veiðan ikki er fiskað í samsvari við semjur í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum um at gagnnýta og verja sjófeingi, sum Føroyar hava tikið undir við.

*§ 31 a - Avhending av rættindum til felags árskvotur og felags fiskidagar*
Her er talan um eina nýggja áseting, sum ger tað gjørligt at avhenda øðrum fiskifari rættindini at fiska av felags árskvotu ella felags fiskidøgum, sum Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv. Við hesum verða rúmari møguleikar hjá vinnuni at skipa fiskiskapin optimalt. Tað kann eisini stuðla undir, at tøkir fiskimøguleikar uttan fyri føroyskan sjógv, sum mest verða gagnnýttir.

*§ 34, stk. 2, 1. pkt., nr. 3 og 6 - Víðka heimildir til at áseta í kunngerð tað, sum er samtykt við grannalondini um eftirlit í fiskiskapinum eftir uppsjóvarfiski og aðrar tillagingar*
Føroyar hava í nógv ár samstarvað við grannalondini um eftirlit í fiskiskapinum eftir uppsjóvarfiski. Yvirskipaða endamálið við samstarvinum er at fáa reglurnar at samsvara, soleiðis at eftirlitið við uppsjóvarveiðu í øllum londunum byggir á somu grundreglur. Hesar reglur snúgva seg bæði um treytir um innrætting og útgerð umborð á skipum og um treytir í samband við innviging av veiðu.

Føroyar undirritaðu í november 2022 endurskoðaða avtalu við Bretland, ES, Grønland, Ísland og Noreg um eftirlit við fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski. Avtalan áleggur nýggj og víðkað krøv til eftirlit, viging, fráboðanir og útgerð. Nógvar av hesum ásetingum eru ikki fevndar av heimildunum í verandi føroyska regluverkinum, og tí er neyðugt at víðka heimildirnar at áseta reglur í kunngerð í § 34, stk. 2.

Endamálið við uppskotinum er tí at víðka um viðkomandi heimildir fyri at tryggja, at heimildin í § 34, stk. 2 í løgtingslógini um sjófeingi er nøktandi til at fremja tær reglur og tey tiltøk, sum eru ásett í endurskoðaðu avtaluni frá 2022 um eftirlit við fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski.

*§ 37, stk. 1 - Bann at blaka veiðu út*
Endamálið er eisini at umorða ásetingina um útblakingarbann, so hon er neyvari og greiðari.

*§ 41 a - Landing uttanlands av uppsjóvarfiski*
Landsstýrisfólkið hevur heimild til at geva undantak frá avmarkingini fyri at landa og avreiða uppsjóvarfisk uttanlands. Hendan heimildin hevur m.a. verið brúkt til at geva undantak í førum, har fløskuhálsar hava verið í samband við landing av t.d. svartkjafti.

Undantak hevur verið latið fyri ávís fiskasløg og ávís tíðarskeið, og undantakið er latið í kunngerð. Hetta er ikki ein nóg skjótur viðgerðarháttur til hesar støður. Tørvur er tí á heimild til skjóta viðgerð, sum loysir tílíkar avbjóðingar "her og nú".

Ætlanin er tí at geva landsstýrisfólkinum heimild til at geva undantak við eini fráboðan ístaðin fyri í kunngerð. Harvið gerst tað smidligari at taka hædd fyri umstøðunum, sum vinnuni er álagt, samstundis sum tað fer at bera til at avmarka tíðarskeiðið, so undantak frá at landa í Føroyum einans verður galdandi, tá veruligur tørvur er á tí. Undantak skal bert verða

givið fyri tað tíðarskeið, sum eftir eina ítøkiliga meting verður mett at vera neyðugt í tí einstaka førinum. Tíðarskeiðið á 14 dagar er sett sum eitt yvirskipað mark, men er ikki endaligt. Tíðarskeiðið kann tí verða longt, um grundarlag framvegis er fyri undantaki, tá 14 dagar eru farnir. Hinvegin er væntandi, at tíðarskeiðið sum oftast verður styttri enn 14 dagar. Mett verður, at broytingin fer at gera, at størri partur av svartkjaftinum fer at verða landaður og avreiddur í Føroyum.

Undantak verður lýst við eini fráboðan. Fráboðanir, sambært hesi áseting, verða lýstar í Kunngerðablaðnum samsvarandi § 2, stk. 1 í løgtingslóg um kunngerðablað og eru ikki ætlaðar sum frávik frá kunngerðarkravinum.

*§ 52 a - Talgild viðgerð og gjald fyri avgreiðslur*
Broytingin gevur Fiskiveiðieftirlitinum heimild til at seta krav um brúk av talgildum skipanum, serliga í sambandi við avgreiðslumál og gjald fyri hesi. Tó skal undantak vera galdandi fyri serlig føri; her verður serliga hugsað um borgarar, ið av grundaðari orsøk ikki hava møguleika ella førleikar at brúka talgilda pallin. Endamálið er at tryggja rættar skrásetingar og gera viðgerðina av málum smidligari og helst eisini skjótari.

Ásetingin hevur ikki nýggj gjøld við sær og broytir ikki verandi gjøld.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

*§ 7, stk. 1 og 2 – Longd gildistíð*
Við hesum lógaruppskoti verður skotið upp at broyta gildistíðina til 1. januar 2037. Gildistíðin verður sostatt longd, og frá 1. januar 2027 verður gildistíðin 10 ár.

*§ 7, stk. 4 - Frágreiðing fyri Løgtingið*
Við hesum lógaruppskoti verður skotið upp at broyta § 7, stk. 4 soleiðis, at landsstýrisfólkið leggur frágreiðing fyri Løgtingið á øðrum hvørjum ári, heldur enn á hvørjum ári, sum galdandi § 7, stk. 4 ásetur.

Hetta verður mett skynsamt og hóskandi, bæði politiskt og umsitingarliga, tí tilfar og viðgerð kunnu gerast meira viðkomandi og týðandi til hesa frágreiðing og viðgerð.

Talan er ikki um innihaldsliga broyting viðvíkjandi sjálvari frágreiðingini.

*§ 22, stk. 1 og 2 - Heimild til at skipa fiskiskapin og at lýsa árligar kvotunøgdir við eini fráboðan*
Við hesum lógaruppskoti er ikki talan um eina nýggja rættarstøðu, sum í sjálvum sær fer at hava við sær broytingar í verandi skipanum. Endamálið er at nágreina núverandi heimildir.

Heimildin í § 22, stk. 1 verður umorðað, so orðaljóðið er einfaldari og í samsvari við tær orðingar, sum áður hava verið.

Talan er sostatt um somu heimild, sum enn skal umsitast í samsvari við fyrilit til lívfrøðiliga, búskaparliga og samfelagsliga burðardygd.

Samstundis verður heimildin at skipa Føroyabanka í stk. 2 strikað. Hetta hevur ikki við sær eina nýggja rættarstøðu, men merkir bert, at heimildin at skipa Føroyabanka frameftir er í § 22, stk. 1.

Føroyabanki er partur av føroyskum sjógvi, og ongin orsøk er at hava eina sjálvstøðuga heimild til hetta økið.

Hóast § 22, stk. 1 er mett at vera nøktandi heimild til at skipa Føroyabanka í dag, verður høvið tó nýtt at orða ásetingina einfaldari fyri at tryggja, at hon frameftir er nøktandi heimild til at skipa fiskiskapin á Føroyabanka.

Uppskotið hevur eisini við sær, at landsstýrisfólkið kann lýsa ásettar kvotur, felags árskvotur (felags kvotupartar umroknaðir til tons) o.tíl. við eini fráboðan.

Ætlanin er tó framvegis at skipa fiskiskapin í kunngerð, sum er rætti hátturin, tá reglur verða gjørdar, sum binda borgararnar ella geva teimum rættindi.

Sjálvt býtið av rættindum skal tí framhaldandi skipast í kunngerð. Sjálvur býtislykilin eigur tó at vera so mikið fastur, at hann ikki broytist ár um ár uttan so, at serligar ella nýggjar umstøður tala fyri tí. Tá hesin er lagdur fastur í kunngerð, kunnu kvotunøgdir og líknandi eftir hetta lýsast við eini fráboðan. Tað, sum frameftir fer at verða lýst við eini fráboðan, er t.d. tann føroyska kvotan, heildarkvotan og nøgdir, sum sambært lógini fara av heildarkvotuni til aðrar kvotur, býtið av heildarkvotuni og tað, sum verður sett av til hjáveiðu o.s.fr.

Ein fráboðan kann sostatt ikki brúkast til at skipa fiskiskapin ella til at áseta reglur um skipan, býti o.s.fr. Fráboðanin kann einans brúkast til at upplýsa um kvotunøgdir, fiskidagatal og aðrar upplýsingar, sum eru skipaðar innan fyri karmarnar í kunngerðum.

Fleiri av ásetingunum í kunngerðum um hesar kvotur eru longu í dag bert upplýsandi um býtið, sum longu er regulerað aðrastaðni, m.a. í sjálvari lógini, sum sigur, hvussu nógvur makrelur, svartkjaftur og norðhavssild skal setast av til menningarkvotur, vinnuligar royndir og verkætlanir, umframt uppboðssølukvotur. Tað eru tó eisini ásetingar um býtið, sum verða gjørdar í kunngerð. Tað eru kvoturnar til teir bólkar av søguligum aktørum, sum fáa tillutað tað, sum er eftir, tá alt annað er tillutað. Tað er serliga býtið av hesum kvotupørtum, sum skal leggjast í fasta legu, soleiðis at felags kvotupartarnir kunnu boðast frá í kunngerð, meðan árligu ásettu kvoturnar, felags árskvoturnar o.tíl. verða kunngjørdar við eini fráboðan.

Í dag verða allar upplýsingar um kvotur, árskvotur, felags kvotupartar o.a. gjørdar í kunngerð. Hetta er ein orkukrevjandi háttur at brúka. Við nýggju heimildini fær landsstýrisfólkið heimild til at boða frá árligum kvotunøgdum við eini fráboðan. Heimildin fevnir eisini um fiskidagar sambært hesi áseting.

Hetta skal lætta um umsitingina, men endamálið er eisini at gera útlutanina meiri gjøgnumskygda við at hava hana á einum staði og seta hana upp á ein hátt, sum er meira gjøgnumskygdur og samanhangandi fyri rættindahavarar at skilja.

Sambært § 2, stk. 1 í løgtingslóg um kunngerðablað skulu kunngerðir og aðrar almennar fyriskipanir, givnar av landsstýrinum, lýsast í Kunngerðablaðnum. Fráboðanir, sambært § 22, verða lýstar í Kunngerðablaðnum samsvarandi hesi áseting. Heimildin er sostatt ikki ætlað sum eitt frávik frá kunngerðarkravinum.

Hetta er ein heimild til landsstýrisfólkið um at kunna nýta eina fráboðan, og tá tað verður gjørt, skulu greiðar mannagongdir gerast fyri at lýsa eina fráboðan, undir hesum um at hoyra, kunngera og um gildiskomu av hesum fráboðanum.

*§ 26, stk. 1-3 - Heimild til at banna førum undir fremmandum flaggi at m.a. umskipa í føroyskum sjógvi og havnum*
Endamálið við at broyta § 26 er yvirskipað at banna førum undir fremmandum flaggi at taka ímóti vørum og tænastuveitingum, sum stuðla undir fiskiskapi. Harumframt er endamálið at fáa nøktandi heimild til at sýta loyvi til umskiping o.tíl. í føroyskum sjógvi og havnum, tá veiðan ikki er fiskað í samsvari við altjóða samtyktir, sum Føroyar hava tikið undir við.

Í hesum sambandi verða málsligar tillagingar og nágreiningar gjørdar í § 26, stk. 1 við tað, at uppreksanin av ymiskum gerðum verður strikað, og ístaðin verður skrivað "o.tíl." Hetta verður gjørt fyri at gera lógartekstin einfaldari og fyri at nágreina, at talan er um dømir, og ásetingin ikki lýsir vavið av ásetingini til fulnar.

Fevnt av ásetingini er enn virksemi, so sum at umskipa veiðu, uppskipa veiðu, virka, pakka ella á annan hátt handfara veiðu ella úrdrátt úr veiðu, umskipa útgerð ella ankra upp við tí í hyggju at taka lut í umskiping av veiðu ella taka inn útgerð o.tíl.

Harafturat verður stk. 1 víðkað, soleiðis at heimild er at banna førum undir fremmandum flaggi at taka ímóti vørum og tænastuveitingum, sum stuðla undir fiskiskapi.

§ 26, stk. 2 verður tillagað, so hon samsvarar við stk. 1.

Síðani verður stk. 3 lagt afturat § 26. Ásetingin hevur við sær eina heimild til at sýta útlendskum skipum at taka ímóti vørum og tænastuveitingum, sum stuðla undir fiskiskapi, og at umskipa o.tíl. í føroyskum sjógvi og havnum, tá fiskiskapurin er í ósamsvari við semjur í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum um at gagnnýta og verja sjófeingi, sum Føroyar eru partur av. Um loyvi verður sýtt sambært stk. 3, kunnu hesi skip ikki taka ímóti vørum ella tænastuveitingum ella umskipa o.tíl. í føroyskum sjógvi og føroyskum havnum, hóast tey annars lúka treytirnar um nøktandi eftirlit. Økisbundnir fiskiveiðifelagsskapir, sum Føroyar eru partur av, eru t.d. NEAFC og NAFO.

Galdandi § 26 er bygd upp soleiðis, at bannað er øllum útlendskum skipum at umskipa o.tíl. í føroyskum sjógvi og føroyskum havnum. Undantak kann kortini gevast, og við tíðini er hetta undantakið vorðið ógvuliga breitt. Undantak verður givið til bæði fiskiskap, sum er fevndur av avtalum og eisini til annan fiskiskap. Skip hava gjøgnum tíðina fingið standandi loyvi, um tey lúka treytir um nøktandi eftirlit og annars lúka aðrar ásetingar í lógini um, t.d. ikki at hava tikið lut í ólógligum, ófráboðaðum og óskipaðum fiskiskapi (ÓÓÓ-fiskiskapur). Við nýggju ásetingini í hesum lógaruppskoti kann undantak tó sýtast, um fiskiskapurin er í ósamsvari við altjóða avtalu ella semju, sum Føroyar eru partur av. Talan er sostatt um eitt undantak frá undantakinum um at geva loyvi.

Harumframt fer ásetingin at fevna um at taka ímóti vørum og tænastuveitingum, sum stuðla undir fiskiskapi. Hetta verður fevnt av banninum í stk. 1, og undantak verður síðani latið sambært stk. 2, um nøktandi eftirlit kann havast við teimum aktivitetum, sum liggja innan fyri virkisøkið hjá Fiskiveiðieftirlitinum. Undantak kann síðani sýtast, um fiskiskapurin er í ósamsvari við semjur í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum, sum Føroyar hava tikið undir við.

Viðvíkjandi ÓÓÓ-fiskiskapi er hesin fevndur av § 27, sum ásetur, at skip undir fremmandum flaggi ikki kann koma í føroyskt sjóumveldi ella føroyska havn, um staðfest verður, at skipið hevur luttikið í ÓÓÓ-fiskiskapi ella stuðlað slíkum fiskiskapi. Áðrenn loyvi verður givið til umskiping o.a., verður tí t.d. altíð eftirkannað, um skipið er á ÓÓÓ-listum hjá økisfelagsskapum. Hetta verður gjørt samsvarandi teimum skyldum, Føroyar hava átikið sær við at taka undir við og staðfesta FAO-sáttmálan um at banna, fyribyrgja og forða ÓÓÓ-fiskiskapi.

*§ 31 a - Avhending av rættindum til felags árskvotur og felags fiskidagar*
Skotið er upp at seta eina nýggja áseting inn í lógina, sum ger, at tað eisini ber til at avhenda rættindi til felags árskvotur og felags fiskidagar fyri seg. Eftir galdandi lóg um sjófeingi er heimild til at flyta fiskimøguleikar millum fiskifør við at flyta veiðiloyvið á annað fiskifar við veiðiloyvi, ella á fiskifar við ongum veiðiloyvi (§ 28). Tá fylgja øll fiskiloyvi, kvotur og fiskidagar við. Somuleiðis kunnu egnir fiskidagar (§ 30) ella egnar árskvotur (§ 31) avhendast øðrum fyri eitt ár í senn ella endaliga.

Broytingin ber í sær, at tað eisini er møguligt at flyta ella avhenda rættindi til at fiska av føroyskum felagskvotum ella felags fiskidøgum uttan fyri føroyskan sjógv fyri eitt fiskiár í senn. Dømi um slík rættindi er atgongd til at fiska av felagskvotu eftir kongafiski í altjóða sjógvi í Norðurhavi í NEAFC-økinum.

Mett verður, at hendan broytingin fer at gera tað smidligari hjá vinnuni at brúka tøkar fiskimøguleikar optimalt og kann stuðla undir, at sum mest verður gagnnýtt av tøkum føroyskum fiskimøguleikum uttan fyri føroyskan sjógv.

*§ 34, stk. 2, 1. pkt., nr. 3 og 6 - Víðka heimildir til at áseta í kunngerð tað, sum er samtykt við grannalondini um eftirlit og aðrar tillagingar*
Broytingarnar í § 34, stk. 2 víðka heimildina til at áseta reglur í kunngerð. Hetta fevnir um treytir um innviging og vigingarskipanir og skyldu at skráseta og goyma upplýsingar. Harumframt verður heimildin víðkað til at áseta treytir um innrætting og útbúnað umborð, og at krevja góðkendar tekningar av skipum og útbúnaði. Við hesum verður tryggjað, at krøvini í altjóða avtaluni frá 2022 kunnu setast í gildi, serliga reglur um, hvussu landingar skulu vigast, hvussu frystur fiskur verður vigaður, um tekniskar skipanir og um eftirlit við landing.

*§ 37 - Bann at blaka veiðu út*
Reglurnar, sum banna at blaka veiðu út, verða umorðaðar, so tær fata um øll sløg av fiskiveiðu, ið koma undir virkisøkið í lógini. Verandi orðing fevnir í grundini bert um fiskiskap við skipi ella báti. Lógin heimilar eisini at skipa fiskiskap frá landi og í áum, vøtnum, ósum og løkum.

*§ 41 a - Landing uttanlands av uppsjóvarfiski*
Við lógaruppskotinum verður eitt nýtt stykki sett inn í § 41 a, sum heimilar landsstýrisfólkinum at lýsa bráðfeingis undantak frá at landa og avreiða í Føroyum fyri ávíst fiskaslag, tá tað eftir umstøðunum er neyðugt.

Broytingin gevur landsstýrisfólkinum heimild til at lýsa tíðaravmarkað undantak frá avmarkingini um, at í mesta lagi 25% av veiðuni av svartkjafti, makreli og norðhavssild kann landast uttanlands.

*§ 52 a - Talgild viðgerð og gjald fyri avgreiðslur*
Broytingin gevur landsstýrisfólkinum heimild til at áseta nærri treytir um framferðarhátt í sambandi við avgreiðslu og gjald fyri avgreiðslu, umframt at Fiskiveiðieftirlitið fær heimild til at krevja, at avgreiðsla av loyvum og váttanum verður framd umvegis talgildan pall.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi varð sent til hoyringar 19. november 2025 við hoyringarfreist til 5. januar 2026.

Uppskotið varð sent til hoyringar hjá Fiskivinnuráðnum, Felagnum Trolbátar og Vørn.
Inn komu hoyringarsvar frá Fiskivinnuráðnum (FVR), Felagnum Nótaskip, Føroya Reiðarafelag, P/F EFHO, P/F Líraberg og Vørn.

Broytingin í § 7, stk. 1 og 2 um longda gildistíð bleiv send Fiskivinnuráðnum til hoyringar við stuttari freist tann 24. apríl 2026. Inn komu hoyringarsvar frá Fiskivinnuráðnum (FVR), Felagnum Nótaskip og Føroya Reiðarafelag.

Øll innkomin hoyringarsvar eru løgd við hesum uppskoti, og niðanfyri er ein samandráttur av innkomnu hoyringarviðmerkingunum til høvuðsbroytingarnar í uppskotinum og støða landsstýrismansins til viðmerkingarnar:

*§ 7, stk. 1 og 2 – Longd gildistíð*
Tikið verður undir við at leingja gildistíðina. Felagið Nótaskip og Føroya Reiðarafelag ynskja tó aðrar loysnir, og føra m.a. fram, at gildistíðin verður longd upp í 12 ár, ella at ásett verður ein uppsagnarfreist.

*§ 7, stk. 4 - Frágreiðing til Løgtingið annaðhvørt ár í staðin fyri hvørt ár*
Tikið verður sum heild undir við ásetingini. Felagið Nótaskip og Føroya Reiðarafelag meta, at tað er ein hóskandi tillaging, at frágreiðing um fyrisiting av sjófeingi verður løgd fyri Løgtingið annaðhvørt ár, og vísa á, at tað ikki eru so stórar broytingar frá ári til ár, at ein árlig frágreiðing er neyðug. Vørn vísir á, at frágreiðingin hevur verið týðandi liður í at kunna Løgtingið um ymisk viðurskifti hjá eftirlitinum. Fiskivinnuráðið tekur undir við broytingunum og vísir í hesum sambandi á, at líknandi er galdandi á aliøkinum.

*§ 22 - Heimild til at skipa fiskiskapin og nýtsla av fráboðanum*
Felagið Nótaskip og Føroya Reiðarafelag taka undir við, at ásettar føroyskar kvotur kunnu lýsast við fráboðan í staðin fyri í kunngerð. Bæði feløg leggja dent á, at nýtsla av fráboðan er ætlað at gera umsitingina smidligari, og at heimildin bert eigur at nýtast í teimum førum, har kvotutøl verða dagførd, og ikki til at broyta grundleggjandi býtið av fiskirættindum millum bólkar og skip. FVR tekur undir við broytingunum, men vísir á, at nýtsla av fráboðanum einans eigur at fevna um broytingar í kvotum og fiskidøgum.

P/F EFHO og P/F Líraberg mótmæla broytingunum í § 22. Feløgini halda, at stk. 2 er ein serheimild viðvíkjandi Føroyabanka, og at strika hesa heimild kann hava inntriv við sær í longu ásett fiskirættindi og reisir spurningar um rættartrygd. Viðvíkjandi heimildini at nýta fráboðan halda feløgini, at hetta flytur avgerðarvald frá Løgtinginum til fyrisitingina, og at slík skipan kann hava neiligar avleiðingar fyri rættartrygdina, serliga tá talan er um broytingar, sum kunnu ávirka longu ásett fiskirættindi.

*§ 26 - Fremmand skip, bunkring og tænastuveitingar*
Føroya Reiðarafelag tekur sum meginreglu undir við, at heimild verður givin at sýta fremmandum skipum at taka ímóti vørum og tænastuveitingum í føroyskum havnum. Felagið vísir samstundis á, at slík heimild er víð, og at hon eigur at verða nýtt við stórum varsemi, tí hon kann hava avleiðingar fyri altjóða fiskiveiðiavtalur og viðurskifti Føroya við onnur lond. Umframt hetta viðmerkir FVR, at tað er ógreitt, hvørjar avtalur eru fevndar av ásetingini. Vørn vísir á, at broytingarnar í § 26 reisa ymiskar spurningar viðvíkjandi heimildum at regulera hetta økið, harundir viðvíkjandi virkisøkinum og heimildargrundarlagnum.

*§ 31 a - Avhending av felags árskvotum og felags fiskidøgum*
FVR og Føroya Reiðarafelag taka undir við heimildini at avhenda felags árskvotur og felags fiskidagar uttan fyri føroyskan sjógv fyri eitt fiskiár í senn. Mett verður, at slík heimild kann betra møguleikarnar at gagnnýta kvotur og fiskidagar við teimum skipum, sum eru best egnað til fiskiskapin.

Vørn vísir á, at skipanin við felagskvotu hevur virkað væl, men ger samstundis vart við, at ávís viðurskifti knýtt at felagsrættindum kunnu geva avbjóðingar í sambandi við umsitingina, sum greiða má fáast á.

*§ 34 - Innviging, skráseting og eftirlit*
Føroya Reiðarafelag vísir á, at treytir til innviging og skráseting skulu vera hóskandi og rímiligar sammett við eftirlitið, og at atlit eisini eiga at verða tikin at virksemi umborð, so fiskiskapur og arbeiði ikki verða tarnað óneyðugt.

Vørn vísir á, at tørvur er á greiðum heimildum at áseta treytir til innviging, veita góðkenning og goyma upplýsingar o.a.

*§ 37 - Bann móti at blaka og sleppa veiðu út*
Vørn tekur undir við nýggju orðingini. Føroya Reiðarafelag vísir á, at í samband við bannið er umráðandi, at undantaksheimildir eru greiðar og rímiligar, so fiskiskapur kann rekast skynsamt í serligum førum.

*§ 41 a - Undantak frá landingarkravi og gildistíð*
Felagið Nótaskip og Føroya Reiðarafelag taka undir við, at undantøk frá landingarkravinum kunnu lýsast við eini fráboðan í staðin fyri í kunngerð. Bæði feløg vísa á, at verandi skipan er umsitingarliga tung, og at møguleikin fyri skjótari fráboðan er ein fyrimunur. Samstundis mótmæla tey, at fráboðanin einans kann vera galdandi í mesta lagi 14 dagar í senn, og mæla til, at gildistíðin verður longri, t.d. upp til fýra vikur. FVR vísir á, at royndir frá fiskiskapi hava víst, at longri gildistíð kann vera neyðug í ávísum førum.

Vørn vísir á, at broytingin fer at vera nakað meira umsitingarliga krevjandi, men hevur annars ongar viðmerkingar til broytingina.

*§ 52 a - Talgild avgreiðsla og gjøld*
Føroya Reiðarafelag hevur ongar serligar viðmerkingar, men leggur dent á, at talgild avgreiðsla eigur at vera so smidlig sum gjørligt fyri brúkarar í fiskivinnuni.

**Viðmerkingar landsstýrismansins**

Landsstýrismaðurin heldur fast við tær broytingar í sjófeingislógini, sum eru lagdar fram í lógaruppskotinum, og metir, at tær í høvuðsheitum eru neyðugar og hóskandi til at gera verandi ásetingar greiðari og lættari at umsita.

Lógarteksturin í § 26, stk. 3 verður tó broyttur soleiðis, at heimildin at sýta fiskiførum undir fremmandum flaggi at umskipa o.tíl., harumframt at taka ímóti vørum og tænastuveitingum, sum stuðla undir fiskiskapi, verður avmarkað til at fevna um fiskiskap sambært samtyktum í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum, sum Føroyar hava tikið undir við. Hetta avmarkar teir vansar í umsitingini av ásetingini, sum Føroya Reiðarafelag og FVR vísa á.

Harumframt verða viðmerkingarnar til § 41 a nágreinaðar, so tað er greitt, at tíðarskeiðið á 14 dagar at geva undantak frá kravinum um at landa í Føroyum ikki er endaligt. Undantak kann framvegis bert gevast, tá umstøður eru fyri hesum, og skal vera givið fyri tað tíðarskeið, sum grundarlag er fyri eftir eini ítøkiligari meting í tí einstaka førinum. Tíðarskeiðið á 14 dagar er sett sum eitt yvirskipað mark, men forðar ikki fyri, at undantakið kann verða longt. Tað er hinvegin væntandi, at undantakið sum oftast verður givið fyri styttri tíð enn 14 dagar.

Umframt hesar og onkrar aðrar smávegis nágreiningar fer landsstýrismaðurin eisini at nýta høvið at viðmerkja og nágreina ymiskar spurningar viðvíkjandi § 22 og heimildargrundarlagnum, sum er komið fram í hoyringarviðmerkingunum.

Viðvíkjandi § 22 viðmerkir landsstýrismaðurin, at broytingarnar hava til endamáls at gera heimildina at skipa fiskiskapin greiðari og einfaldari, uttan at broyta virkisøkið hjá verandi heimildum. Hetta framgongur eisini greitt av viðmerkingunum til broyttu ásetingina, og tað er tí ongin vandi fyri, at henda broyting fer at hava tær avleiðingar, sum P/F EFHO og P/F Líraberg vísa á, m.a. at heimildin skal kunna nýtast til at broyta býtið av fiskirættindum ella gera inntriv í longu ásett rættindi.

Landsstýrismaðurin er hinvegin ikki samdur í teirra tulking av virkisøkinum hjá verandi heimildum, og at tað er so avmarkað, sum ført er fram. Hetta er tó ein serstakur spurningur, sum núverandi broytingaruppskot ikki fevnir um.

Viðvíkjandi nýtslu av fráboðanum framgongur greitt av viðmerkingunum í hesum lógaruppskoti, at hetta amboð er ætlað at nýta í sambandi við at lýsa ásettar føroyskar kvotur og líknandi fyriskipanir, og ikki til regulering av fiskiskapinum ella broyting av býti av fiskirættindum. Ein fráboðan er sostatt eitt umsitingarligt amboð innan fyri verandi skipan, og er ikki ætlað at verða nýtt til grundleggjandi regulering. Tað er tí ikki vandi fyri, at henda broyting fer at hava tær avleiðingar, sum P/F EFHO og P/F Líraberg vísa á viðvíkjandi nýtslu av fráboðanum, undir hesum at heimildin skal kunna nýtast til at broyta býtið av fiskirættindum ella gera inntriv í longu ásett rættindi.

Bæði P/F EFHO og P/F Líraberg hava annars nógvar viðmerkingar viðvíkjandi heimildunum í sjófeingislógini, og okkurt krevur nærri greining, men tað hevur tó ikki týdning fyri hetta lógaruppskotið og verður tí ikki viðgjørt nærri í hesum sambandi.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur ikki beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri land ella kommunur. Broytingarnar í uppskotinum snúgva seg í høvuðsheitum um at nágreina og tillaga verandi heimildir í sjófeingislógini. Tær fevna m.a. um at leggja frágreiðingina fyri Løgtingið annaðhvørt ár, at fáa ella nágreina heimildina at skipa fiskiskapin og at lýsa reglur við eini fráboðan, heimild til at sýta útlendskum skipum at taka ímót vørum og tænastuveitingum, harumframt at sýta teimum loyvi at koma í havn til umskiping o.tíl., heimild til at geva undantak frá brúkstreytini, heimild til at avhenda felagsrættindi, heimildir í samband við eftirlit, talgilda avgreiðslu og rindan av gjøldum, og um at nágreina reglurnar um útblaking av veiðu.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri kommunur, men fleiri av broytingunum vera mettar at hava týdning fyri umsitingina hjá landinum, tað vil siga teimum myndugleikum, sum umsita lógina.

Kravið í § 7, stk. 4 um at leggja frágreiðing fyri Løgtingið annaðhvørt ár, heldur enn á hvørjum ári, fer at lætta um arbeiðið hjá umsitingini. Heimildin í § 22 at lýsa býtið av rættindum við eini fráboðan, heldur enn í kunngerð, fer somuleiðis at gera fyrisitingina einfaldari og minni orkukrevjandi.

Nýggju heimildirnar mótvegis fiskiførum undir fremmandum flaggi í § 26 fara at hava nakað av umsiting við sær fyri Fiskiveiðieftirlitið.

Broytingarnar í § 34, stk. 2, um víðkaðar eftirlitsheimildir, fara at hava við sær nakað av eyka umsiting hjá myndugleikunum.

Ásetingin um útblaking í § 37 verður greiðari, og tað fer eisini at lætta um umsitingina av henni.

Nýggja heimildin í § 41 a at lýsa bráðfeingis undantak frá landingarkravinum við eini fráboðan fer at gera fyrisitingina smidligari, serliga í støðum, har tørvur er á skjótari avgerð.

Heimildin í § 52 a at krevja, at borgarin skal nýta talgildar skipanir til avgreiðslu og samskifti í samband við fiskiskap fer somuleiðis eisini at gera fyrisitingina smidligari og lætta um hjá rættindahavarum.

Samanumtikið verður mett, at uppskotið hevur avmarkaðar umsitingarligar avleiðingar fyri landið, og at tær kunnu røkjast innan verandi karmar.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið verður mett at hava avmarkaðar og sum heild jaligar avleiðingar fyri vinnuna.

Leingjan av gildistíðini til 10 ár fer at geva vinnuni tryggari karmar.

Broytingarnar í § 22, har heimild verður at lýsa ásettar kvotur, felags árskvotur (felags kvotupartar roknaðir um til tons) o.tíl. við eini fráboðan, hava serligan týdning fyri vinnuna. Hetta fer at gera fyrisitingina meira smidliga og tryggjar skjótari tillaging til broyttar støður. Samstundis er ætlanin, at útlutanin av rættindum skal gerast meira gjøgnumskygd.

Nýggja heimildin í § 31 a, sum loyvir flyting av fiskiloyvum, verður mett at fara at gagna vinnuni, tí rúmari møguleikar verða at leggja til rættis og at gagnnýta tøkar fiskimøguleikar uttan fyri føroyskan sjógv.

Broytingarnar í § 34 víðka heimildirnar hjá myndugleikunum til at áseta reglur í kunngerð um innviging, innrætting og útbúnað umborð, so krøvini kunnu dagførast og samsvara við avtalur við onnur lond og altjóða reglur. Hetta kann krevja tillagingar hjá skipunum.

Broytingin í § 37, stk. 1 víðkar bannið at blaka út veiðu til eisini at fevna um at sleppa út veiðu, og avmarkar sostatt møguleikarnar hjá vinnuni á hesum øki.

Nýggja heimildin í § 41 a at lýsa bráðfeingis undantak frá landingarkravinum við eini fráboðan fer at gera fyrisitingina smidligari og hjálpa vinnuni at sleppa skjótari uttanlands, so virðir ikki fara fyri skeyti. Samstundis verður tryggjað, at undantøkini ikki vera longri enn neyðugt, og at størri partur av veiðuni verður landaður í Føroyum.

Nýggja heimildin í § 52 a, til talgilda avgreiðslu og rindan av gjøldum, fer at gera samskiftið við myndugleikarnar einfaldari og skjótari, og fer samstundis at lætta um umsitingina hjá vinnuni.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**

Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**

Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**

Viðvíkjandi flestu ásetingum eru ongar bindingar úr millumtjóðasáttmálum á økinum.

Broytingin í § 26 gevur myndugleikanum greiða heimild til at sýta útlendskum skipum loyvi at taka ímóti vørum og tænastum, harumframt at umskipa veiðu o.tíl., tá veiðan ikki samsvarar við altjóða semjur og avtalur millum Føroyar og onnur lond. Endamálið er at tryggja, at Føroyar kunnu verja síni áhugamál, tá ósamsvar er millum veiðu hjá útlendskum skipum og tær avtalur, sum Føroyar hava part í.

Viðvíkjandi broytingini í § 34, stk. 2, so eru Føroyar við í millumtjóða samstarvsavtalu um eftirlit í fiskiskapinum eftir uppsjóvarfiski í landnyrðingspartinum av Atlantshavinum.

Samstarvið miðar m.a. eftir at fáa samsvar í eftirlitsreglurnar hjá avtalupørtunum í samband við fiskiskap og landing. Avtalan er nýliga endurskoðað og broytt við nýggjum og víðkaðum reglum, sum krevja tillagingar í lógini.

Broytingarnar í § 34, stk. 2 víðka heimildirnar hjá myndugleikunum at áseta reglur í kunngerð um eftirlit, viging, fráboðanir, innrætting og útbúnað umborð. Endamálið er at tryggja, at føroyskar reglur samsvara við altjóða avtaluna um eftirlit við fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski, sum Føroyar, Bretland, ES, Grønland, Ísland og Noreg undirritaðu í november 2022.

Uppskotið verður mett at fremja og tryggja, at føroyska lóggávan lýkur tær nýggju og víðkaðu skyldurnar sambært hesi avtaluni, og hevur ikki aðrar avleiðingar í mun til altjóða sáttmálar ella reglur.

Viðvíkjandi § 37, stk. 1 um útblaking, so eru allýsingar í millumtjóða avtalu um eftirlit við fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski, um útblaking og slepping av veiðu. Í uppskotinum um at umorða føroysku reglurnar á økinum er nevnda avtala havd í huga.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

Uppskotið samsvarar við Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan og sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**

Uppskotið elvir ikki til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**

Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**

Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**

Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**

Uppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**

Við nýggju § 22, stk. 1 fær landsstýrisfólkið heimild til at lýsa ásettar kvotur, felags árskvotur (felags kvotupartar roknaðir um til tons) o.tíl. við eini fráboðan.

Við § 26, stk. 3 fær landsstýrisfólkið heimild til at sýta útlendskum skipum loyvi at umskipa veiðu o.tíl. í føroyskum sjógvi og í føroyskum havnum, tá ikki er fiskað í samsvari við semjur í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum um at gagnnýta og verja sjófeingi, sum Føroyar hava tikið undir við.

Viðvíkjandi § 34, stk. 2 verða heimildirnar víðkaðar, so landsstýrisfólkið kann áseta reglur í kunngerð um eftirlit, viging, innrætting og útbúnað umborð fyri at fremja altjóða avtaluna um eftirlit við fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski.

Við § 41 a, stk. 3 fær landsstýrisfólkið heimild til at lýsa bráðfeingis undantak frá landingarkravinum við eini fráboðan.

Við § 52 a verður heimild løgd til landsstýrisfólkið at áseta reglur um talgilda avgreiðslu og rindan av gjøldum, umframt at brúka oyðubløð.

Uppskotið leggur ikki nýggjar heimildir til stovn undir landsstýrinum ella kommunur. Heimildin til Fiskiveiðieftirlitið í § 34, stk. 2, nr. 3 viðvíkjandi innviging er ikki nýggj. Hetta er bert ein nágreining av heimildini.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**

Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**

Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**Til nr. 1.**

*§ 7, stk. 1 og 2 – Longd gildistíð*
Skotið verður upp at leingja gildistíðina av veiðiloyvum og rættindum til 1. januar 2037.

Gildistíðin verður sostatt 10 ár frá 1. januar 2027. Um gildistíðin skal leingjast eftir hetta, skal landsstýrisfólkið leggja uppskot fyri Løgtingið um at leingja gildistíðina.

Sambært § 7, stk. 3 leggur landsstýrismaðurin á hvørjum ári uppskot fyri Løgtingið um at leingja gildistíðina á rættindunum við einum ári. Henda áseting lýsir politisku ætlanina fyri at leingja rættindini, men verður tó ikki mett at hava við sær eina lógarásetta skyldu at leggja eitt uppskot fyri Løgtingið. Hinvegin kann landsstýrið altíð leggja eitt uppskot fyri Løgtingið um at leingja gildistíðina við meira enn einum ári, sum gjørt verður nú.

**Til nr. 2.**

*§ 7, stk. 4 - Frágreiðing fyri Løgtingið*
Skotið verður upp at broyta ásetingina soleiðis, at frágreiðingin til Løgtingið skal leggjast fyri á øðrum hvørjum ári í staðin fyri á hvørjum ári.

Broytingin hevur ikki við sær innihaldsligar broytingar í sjálvari frágreiðingini, sum framhaldandi skal viðgera støðuna og gongdina í fiskivinnuni á sjógvi og á landi, væntanir til framtíðarútlit, búskaparlig, samfelagslig og lívfrøðilig viðurskifti, umframt altjóða avtalur, lóggávu og framtíðarætlanir.

**Til nr. 3 og 4.**

*§ 22, stk. 1 og 2 - Heimild til at skipa fiskiskapin í føroyskum sjógvi og at lýsa kvotunøgdir við eini fráboðan*
Yvirskipað skal viðmerkjast, at skotið verður upp at orða ásetingina soleiðis, at landsstýrisfólkið kann skipa fiskiskapin í føroyskum sjógvi. Ásetingin verður sostatt orðað meira yvirskipað og einfalt enn verandi orðing. Harafturat verður hon í samsvari við upprunaligu ásetingina í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, sum hon er framhald av.

Broytingin hevur ikki við sær, at innihaldið í heimildini verður broytt, tað vil siga, at landsstýrisfólkið fær ikki aðrar ella víðari heimildir eftir broytingina, enn tað hevur í dag.

Núverandi stk. 2 ásetir eina serliga heimild til at skipa fiskiskapin eftir botnfiski og øðrum djórasløgum á Føroyabanka og at gera reglur um, hvørjir bólkar og veiðihættir kunnu luttaka í skipanini. Hendan heimildin verður strikað, og Føroyabanki verður frameftir skipaður sambært § 22, stk. 1.

Viðvíkjandi fiskidagaskipanini verður skotið upp at strika, at høvuðsheimildin ikki fevnir um fiskidagaskipanina. Hetta ger ásetingina einfaldari og greiðari. Harafturat er ásetingin

óneyðug, tí ásetingarnar um fiskidagaskipanina í §§ 18 og 19 eru serreglur, sammett við § 22, og galda tí framum, óansæð um fiskidagaskipanin er undantikin í § 22, stk. 1 ella ikki.

Skotið verður harafturat upp, at landsstýrisfólkið kann lýsa árligar kvotur, felags árskvotur (kvotupartar umroknaðir til tons) o.tíl. við eini fráboðan. Hetta fevnir eisini um broytingar í kvotum, (tá nøgdirnar at býta broytast í fiskiárinum), sum henda eftir, at upprunaligu kvoturnar, felags árskvotur o.tíl. eru fráboðaðar.

Ein fráboðan kann ikki brúkast til at skipa fiskiskapin ella til at áseta reglur um skipan, býti o.s.fr. Fráboðanin kann einans brúkast til at upplýsa um kvotunøgdir, fiskidagatal og aðrar upplýsingar, sum eru skipaðar innan fyri karmarnar í kunngerðum.

Rættast er at gera reglur í kunngerð, tá reglur verða gjørdar, sum binda borgararnar ella geva teimum rættindi, og hetta verður eisini gjørt frameftir. Hugsanin er í tí sambandi, at felags kvotupartur, sum er tann prosentpartur av heildarkvotu, sum bólkur av eigarum av fiskiførum hevur rætt at veiða, verður ásettur í kunngerð, sum kann hava gildi longri enn eitt fiskiár, meðan felags árskvotan, sum er felags kvotuparturin, roknaður um til tons, verður (upp)lýstur í eini fráboðan.

Tað skal sostatt bera til at upplýsa kvotunøgdir við eini fráboðan. Heimildin fevnir eisini um fiskidagar sambært hesi áseting.

Sjálvur býtislykilin millum bólkar av eigarum av fiskiførum er vanliga so mikið fastur, at hann ikki broytist ár um ár uttan so, at serligar ella nýggjar umstøður tala fyri tí. Tá hesin er lagdur fastur í kunngerð, kunnu ásettar kvotur, felags árskvotur o.tíl. eftir hetta lýsast við eini fráboðan. Tað, sum frameftir fer at verða lýst við eini fráboðan, eru t.d. tann føroyska kvotan, heildarkvotan og nøgdir, sum sambært lógini fara av heildarkvotuni til aðrar kvotur, býtið av heildarkvotuni og tað, sum verður sett av til hjáveiðu o.s.fr.

Fleiri av ásetingunum um hesar kvotur eru longu í dag bert upplýsandi um býtið, sum longu er reguleráð aðrastaðni, m.a. í sjálvari lógini. Tað eru tó eisini ásetingar um býtið, sum verða gjørdar í kunngerð. Tað er kvotaparturin til teir bólkar, sum fáa tillutað tað, sum er eftir, tá alt annað er tillutað. Tað er serliga býtið av hesum kvotupørtum, sum skulu leggjast í fasta legu, soleiðis at felags árskvoturnar kunnu boðast frá í kunngerð.

Broytta mannagongdin, sum uppskotið leggur upp til, kann lýsast nærri við makrelbýtinum sum dømi. Her verða felags árskvotur ásettar fyri 14 ymiskar bólkar av fiskiførum. Grundarlagið undir býtinum er í tveimum: 1) Ein partur av býtinum er ásettur við lóg: Menningarkvotur, kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir og uppboðskvotur. Lógin sigur, hvussu nógv av makreli skal setast av til hesar kvotur. 2) Hinir bólkarnir eru søguligu aktørarnir: nótaskip, ídnaðarskip, bólkarnir í heimaflotanum o.s.fr. Býtið millum hesar bólkar byggir á fyrisitingarliga siðvenju, ið hevur verið óbroytt í nógv ár.

Eftir hesum eru lutirnir hjá ymisku bólkunum í fastari legu; teir broytast ikki frá einum ári til næsta. Tað er bert felags árskvotan í tonsum, sum broytist, tí tøku nøgdirnar at útluta broytast. Við nýggju heimildini ber til at gera árliga makrelbýtið munandi greiðari og gjøgnumskygdari enn í dag. Reglur, sum allýsa bólkarnar í makrelbýtinum og prosentpartarnar til hvønn bólkin, umframt aðrar tekniskar ásetingar um fiskileiðir, reiðskap o.tíl., verða broyttar árliga í kunngerð, meðan árligu felagskvoturnar í tonsum verða kunngjørdar við eini fráboðan.

Skipanin við makrelinum er dømi um eina lutfalsliga fløkta býtisskipan. Aðrar skipanir eru minni fløktar, og har er tí minni tørvur á at brúka sama leist sum við makrelinum.

Nýggja heimildin fer at lætta um í umsitingini, tí tað verður bert neyðugt at broyta kunngerðir, tá talan er um at broyta býtið millum bólkar av rættindahavarum, sum liggur frammanundan. Um talan hinvegin ikki er um at broyta býtið, er nøktandi bert at upplýsa um útlutanina við eini fráboðan. Karmarnir fyri at brúka eina fráboðan skulu tó vera fullkomiliga greiðir, og gerast skulu fastar mannagongdir fyri, hvussu og nær hoyrast skal, og nær tær fáa gildi o.s.fr. Tær skulu eisini vera gjøgnumskygdar, so útlutanin er greið, eisini yvir tíð. Sambært § 2, stk. 1 í løgtingslóg um kunngerðablað skulu kunngerðir og aðrar almennar fyriskipanir, givnar av landsstýrinum, lýsast í Kunngerðablaðnum. Fráboðanir, sambært § 22, verða lýstar í Kunngerðablaðnum samsvarandi hesi áseting. Heimildin er sostatt ikki ætlað sum eitt frávik frá kunngerðarkravinum.

**Til nr. 5.**

*§ 26, stk. 1-3 - Heimild til at banna førum undir fremmandum flaggi at m.a. umskipa í føroyskum sjógvi og havnum*
Endamálið við at broyta § 26 er yvirskipað at fáa nøktandi heimild til at sýta loyvi til ávísar aktivitetir, um ikki er fiskað í samsvari við semjur í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum um at gagnnýta og verja sjófeingi, sum Føroyar hava tikið undir við. Loyvi kann sýtast at taka ímóti vørum og tænastuveitingum, sum stuðla undir fiskiskapi, og til umskiping o.tíl. í føroyskum sjógvi og havnum.

*§ 26, stk. 1*
Talan er partvíst um eina málsliga tillaging av ásetingini, so hon er einfaldari orðað, og tillagingin tryggjar, at allir aktivitetir, sum hava við fiskiskap at gera, verða fevndir av ásetingini. Hetta verður gjørt á tann hátt, at ístaðin fyri at nevna aktivitetirnar, so verður skrivað “umskipa o.tíl.”, sum skal fevna um allar aktivitetir, sum hava við fiskiskapin at gera. Við at umskipa o.tíl. meinast at fáast við at umskipa veiðu, uppskipa veiðu, virka umborð, pakka ella á annan hátt handfara veiðu ella úrdrátt úr veiðu, umskipa útgerð ella ankra við tí í hyggju at taka lut í umskiping av veiðu ella taka inn útgerð o.tíl. Hetta eru dømir um aktivitetir, sum hava við fiskiskap at gera, og listin er ikki úttømandi.

Harnæst verður stk. 1 víðkað soleiðis, at aktivitetir, sum ikki hava beinleiðis við handfaring av veiðuni at gera, men sum stuðla undir fiskiskapin, eisini eru fevndir av banninum. Talan kann t.d. vera um bunkring, ella at fáa veiting av øðrum tænastum, so sum proviant.

Endamálið er at kunna tryggja, at fremmand før, í ávísum støðum, ikki skulu kunna fáa stuðul til fiskiskapin við at fáa vørur og tænastur í føroyskum sjógvi ella havnum.

*§ 26, stk. 2*
Hendan ásetingin verður umorðað, so hon samsvarar við § 26, stk. 1.

Sambært ásetingini hevur landsstýrisfólkið heimild til at geva førum undir fremmandum flaggi loyvi at umskipa veiðu, uppskipa veiðu, virka umborð, pakka ella á annan hátt handfara veiðu ella úrdrátt úr veiðu, umskipa útgerð ella ankra við tí í hyggju at taka lut í umskiping av veiðu ella taka inn útgerð o.tíl. í føroyskum sjógvi og í føroyskum havnum. Loyvi verður eisini latið at taka ímóti vørum og tænastuveitingum, um nøktandi

eftirlit kann havast við teimum aktivitetum, sum liggja innan fyri virkisøkið hjá Fiskiveiðieftirlitinum.

Loyvi kann bæði gevast, tá talan er um fiskiskap, sum er fevndur av kunngerð, sum skipar fiskiskapin hjá fremmandum førum í føroyskum sjógvi, ið grundar á avtalur, og eisini, tá talan er um fiskiskap, sum ikki er fevndur av slíkum kunngerðum. (Tað fyrra verður vanliga beinleiðis ásett í kunngerðini, ið skipar ávísa fiskiskapin, sum eitt loyvi við treytum, ið Vørn kann lata.)

Tað er neyðugt at seta treytir, sum eru tillagaðar ítøkiliga virkseminum. Um t.d. loyvi verður givið til umskiping av veiðu, kunnu m.a. setast treytir, sum eru neyðugar fyri at tryggja eftirlitið við veiðuni og rætta skráseting av veiðuni. Treytir kunnu eitt nú verða settar um, hvar umskiping skal fara fram, at umskiping bert kann fara fram við bryggju. Treytir kunnu somuleiðis setast um serligar fráboðanir og onnur krøv, sum eru neyðug fyri at tryggja tey fyrilit, sum skulu takast sambært lógini, og fyri at tryggja eftirlit við reglum, sum eru ásettar í lógini ella við heimild í lógini.

Stk. 2 verður víðkað samsvarandi broytingini í stk. 1.

Viðvíkjandi banninum at taka ímóti vørum og tænastum kann loyvi latast, um nøktandi eftirlit kann havast við teimum aktivitetum, sum liggja innan fyri virkisøkið hjá Fiskiveiðieftirlitinum. Bunkring innan fyri 12 fjórðingar í føroyskum sjógvi er tó ikki loyvt sambært kunngerð á umhvørvisøkinum, og her er sostatt talan um eina reglukonflikt. Her gongur umhvørvislóggávan fram um fiskiveiðilóggávuna, og loyvi kann sostatt ikki latast at bunkra innan fyri 12 fjórðinga markið.

*§ 26, stk. 3*
Hetta er ein nýggj áseting, sum ber í sær, at landsstýrisfólkið kann sýta at geva undantak frá banninum at taka ímóti vørum og tænastum og at umskipa í føroyskum sjógvi og havnum, tá talan er um veiðu, sum er fiskað í ósamsvari við semjur í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum um at gagnnýta og verja sjófeingi, sum Føroyar hava tikið undir við. Dømi um økisbundnar fiskiveiðifelagsskapir, sum Føroyar eru partur av, eru NEAFC og NAFO.

Til dømis hevur NEAFC síðani 2021 samtykt bann fyri at veiða kongafisk í Irmingerhavinum, og Føroyar, sum eru strandarland um kongafiskin, hava ásett hetta veiðibann, eins og Ísland, Grønland, ES, Bretland og Noreg hava. Russland hevur hinvegin mótmælt samtyktini og er tí ikki bundið av henni. Russland setur sær áhaldandi kvotu av kongafiski. Talan er ikki um ÓÓÓ-fiskiskap sambært § 27 í lógini, men fiskiskap, sum er ímóti eini samtykt í NEAFC, sum Føroyar hava tikið undir við og eru bundnar av. Ynskiligt er, at landsstýrisfólkið undir slíkum umstøðum kann sýta viðkomandi skipi undir fremmandum flaggi at umskipa o.tíl. í føroyskum sjógvi og føroyskum havnum.

Hetta er ein serlig og avmarkandi heimild, sum skal tulkast trongt og brúkast í samsvari við altjóða reglur, fyrisitingarligar reglur o.s.fr.

**Til nr. 6.**

*§ 31 a - Avhending av rættindum til felags árskvotur og felags fiskidagar*

Hetta er nýggj lógaráseting, sum ber í sær, at tað eisini skal bera til at avhenda rættindi til at fiska av felags árskvotum ella felags fiskidøgum, sum Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, fyri eitt fiskiár í senn. Eftir galdandi lóg um sjófeingi ber til at flyta fiskimøguleikar millum skip við at flyta veiðiloyvi á annað fiskifar við veiðiloyvi ella á fiskifar við ongum veiðiloyvi (§ 28). Hendan heimildin verður brúkt, tá fiskifør verða skift út ella í sambandi við samanleggingar av rættindum hjá tveimum ella fleiri skipum. Tá veiðiloyvi verður flutt, fylgja øll veiðirættindi við.

Somuleiðis kunnu egnir fiskidagar (§ 30) ella egnar árskvotur (§ 31) avhendast øðrum fyri eitt ár í senn ella endaliga, um brúkstreytin er lokin. Tá kann talan vera um at flyta allar fiskidagarnar/kvotuna ella ein part av hesum.

Eftir verandi lóg er ikki heimild at flyta fiskiloyvi, ið geva rætt at fiska av felags árskvotu ella felags fiskidøgum fyri seg. Fyri at vinnan skal kunna hava rúmari møguleikar at skipa gagnnýtsluna av tøku fiskimøguleikunum, er skotið upp, at tað eisini eigur at bera til at avhenda ella flyta fiskiloyvi til fiskiskap uttan fyri føroyskan sjógv, sum er skipaður við felags árskvotu ella felags fiskidøgum.

Flestu kvoturættindi hjá føroyskum fiskiførum verða í dag útlutað sum egnar árskvotur ella egnir fiskidagar. Men tað eru framvegis skipanir, har tøkir føroyskir fiskimøguleikar, uttan fyri føroyskan sjógv, ikki eru býttir út á skip. Eitt dømi er kongafiskur í altjóða sjógvi í Norðurhavi í NEAFC-skipanarøkinum. Her hava Føroyar møguleika at fiska av eini felagskvotu, sum er ásett fyri øll NEAFC-lond. Í fyrisitingini av hesum fiskiskapi er tørvur á heimildini, ið her verður skotin upp. Broytingin gagnar aktørunum í vinnuni, tí teir fáa rúmari møguleikar at leggja til rættis. Hetta kann eisini stuðla undir, at vit fiska sum mest av felagskvotuni. Og góð søgulig veiðitøl kunnu gagna Føroyum, tá felagskvotan verður býtt millum limalondini í NEAFC.

**Til nr. 7.**

*Til § 34, stk. 2, 1. pkt. - Málslig tillaging*
Málslig rætting. Tað er helst ein feilur at “at” er komið inn í lógartekstin.

**Til nr. 8.**

*Til § 34, stk. 2, nr. 3 - Víðka heimildina viðvíkjandi innviging*
Broytingin víðkar verandi áseting, so hon fevnir um treytir um innviging, skyldu at skráseta og goyma upplýsingar og góðkenning av innvigingarskipanum.
Grundgevingin er, at altjóða avtalan frá 2022 krevur, at allur uppsjóvarfiskur verður vigaður við góðkendari skipan, og at upplýsingar skulu goymast í ávíst tíðarskeið. Broytingin er ætlað at geva landsstýrisfólkinum nøktandi heimild til at seta í verk tær reglur, sum ásettar eru í avtaluni fyri 2022.

Avleiðingin er, at vinnan fær víðkaðar skyldur at skráseta og goyma dátur og at nýta góðkendar vigiskipanir.

Núverandi heimildir hjá Vørn, sambært kunngerðum at áseta treytir og góðkenna innvigingarskipanir, verða ikki broyttar við hesum. Talan er bert um at víðka heimildina hjá landsstýrisfólkinum at seta treytir o.a.

**Til nr. 9.**

*Til § 34, stk. 2, nr. 6 - Víðka heimildina viðvíkjandi treytum um innrætting og útbúnað umborð*
Broytingin ger, at ásetingin um innrætting og útbúnað verður víðkað til ikki bert at skula vera í samband við hagreiðing, virking og goymslu av veiðu umborð. Krav um, at skip hava góðkendar tekningar verður eisini víðkað til ítøkiliga at fevna um útbúnað umborð á skipinum.

Grundgevingin er, at altjóða avtalan frá 2022 áleggur størri krøv viðvíkjandi hesum, m.a. at skip skulu hava góðkendar tekningar av øllum útbúnaði, sum hevur týdning fyri handfaring og eftirlit við veiðu, og at hesar tekningar skulu samsvara við veruliga útgerð, eftirkannast regluliga og verða góðkendar av føroyskum myndugleikum.

Avleiðingin er, at skipum verða álagdar nýggjar skyldur at hava og kunna vísa fram góðkendar tekningar, og at myndugleikarnir fáa greiða heimild til at eftirkanna útgerð og tekningar sum liður í eftirliti.

**Til nr. 10.**

*Til § 37, stk. 1 - Bann at blaka veiðu út*
Bann fyri at blaka veiðu útaftur hevur í nógv ár verið ein aðalregla í føroysku fiskivinnulóggávuni. Eftir galdandi áseting er bannað at blaka veiðu fyri borð. Landsstýrisfólkið kann tó geva undantak frá banninum.

Verandi orðing er ov avmarkandi og trong. Í grundini fevnir hon bert um veiðu, sum er fingin umborð á fiskifar. Men eftir lógini hevur landsstýrisfólkið eisini heimild til at skipa fiskiskap frá landi, í áum, vøtnum, ósum og løkum, har veiðan ikki altíð verður tikin "umborð".

Somuleiðis kann tað vera aktuelt at geva undantak frá útblakingarbanninum og loyva sonevndari slepping, t.e. at veiða verður slept úr aftur nót, uttan at veiðan er tikin umborð.

Fyri at gera ásetingina greiðari og neyvari, so útblakingarbannið fevnir um allar hættir at veiða og allan fiskiskap, ið heimild er at skipa við heimild í lógini, er skotið upp at umorða ásetingina, so hon sigur, at bannað er at blaka ella sleppa veiðu útaftur. Við hesum er virkisøkið hjá ásetingini greiðari, tí nú er hon betur lagað til øll sløg av fiskiskapi í skipanini og allar støður, har útblaking kann koma fyri.

Nýggja orðingin í stk. 1 hevur eisini týdning fyri at umsita heimildina í stk. 2 at geva undantak. Tað eigur at vera greitt, hvat tað er, ein gevur undantak frá. Í tí sambandi kann nevnast, at í verandi kunngerðum eru longu reglur, sum áleggja skyldu at sleppa ella seta veiðu útaftur. Til dømis skal hummari, sum er undir ásett minstamát, og hummari við rognum, sleppast útaftur. Annað dømi er skyldan at seta út aftur sjósíl, sum eru undir ásetta minstamátið.

**Til nr. 11.**

*Til § 41 a, stk. 3 - Landing uttanlands av uppsjóvarfiski*
Tá tað eftir núverandi reglum er grundarlag fyri at lýsa undantak frá at landa og avreiða svartkjaft, makrel og norðhavssild í Føroyum, kann hetta gerast við eini fráboðan.

Tað verður sostatt møguligt at lýsa undantak nærum beinanvegin, tá ið tørvur er á tí, og at tað ikki, sum í dag, verður neyðugt at bíða fleiri dagar eftir, at ein kunngerð verður lýst.

Hendan heimildin hevur m.a. verið brúkt til at geva undantak í førum, har fløskuhálsar hava verið í samband við landing av t.d. svartkjafti.

Skipanin gerst smidligari, og hetta ger tað møguligt at lýsa undantak í styttri tíðarskeið, soleiðis at undantak bert er galdandi, tá veruligur tørvur er á tí. Undantak skal bert verða givið fyri tað tíðarskeið, sum eftir eina ítøkiliga meting verður mett at vera neyðugt í tí einstaka førinum. Tíðarskeiðið á 14 dagar er sett sum eitt yvirskipað mark og er ikki endaligt. Tíðarskeiðið kann tí verða longt, um grundarlag framvegis er fyri undantaki. Tað er samstundis væntandi, at tíðarskeiðið sum oftast verður styttri enn 14 dagar.

Undantakið kann í mesta lagi vera galdandi í 14 dagar hvørja ferð. Allir dagar telja við í teimum 14 døgunum, og má nýtt undantak lýsast, um tørvur er á tí.

Undantak verður lýst við eini fráboðan. Fráboðanir, sambært hesi áseting, verða lýstar í Kunngerðablaðnum samsvarandi § 2, stk. 1 í løgtingslóg um kunngerðablað og eru ikki ætlaðar sum frávik frá kunngerðarkravinum.

**Til nr. 12.**

*Heitið á kapitli 13*
Skotið verður upp at dagføra heitið á kapitli 13, so tað endurspeglar innihaldið við broyttu lógargreinunum.

**Til nr. 13.**

*Til § 52 a - Talgild viðgerð og gjald fyri avgreiðslur*
Broytingin gevur landsstýrisfólkinum heimild til at áseta nærri reglur um avgreiðslur og gjald fyri avgreiðslur á talgildum pallum. Orsøkin til broytingina er, at t.d. hevur verið arbeitt við at fáa skipanir til avgreiðslu av eitt nú avhending av fiskiloyvum, veiðiváttanir o.a.

Tað skal vera heimild fyri at krevja, at borgari skal nýta eina talgilda loysn, og at hann skal rinda við talgildum skipanum. Við hesum fær Fiskiveiðieftirlitið heimild til at krevja, at slík loysn verður brúkt í sambandi við alla avgreiðslu av loyvum og váttanum.

Ásetingin hevur eina breiða orðing og nevnir ikki ávísan talgildan pall, hetta fyri at ásetingin ikki skal vera ein forðing fyri tøkniligari menning, tá umstøðurnar tala fyri tí. Sostatt er talgilda viðgerðin ikki avmarkað til bert at vera ein ávís heimasíða, teldupostur ella onnur skipan, men viðgerðin fer fram á tí talgilda pallinum, sum myndugleikin ásetir.

Í stk. 2 er tó eitt undantak, sum er galdandi í serligum førum. Her verður hugsað um borgarar, sum ikki hava møguleika ella førleika til at nýta talgilda pallin. Í slíkum førum má almenni myndugleikin bjóða borgaranum annan samskiftismøguleika. Sum dømi um serligt føri kann vera borgari, ið ber ávíst brek, antin kropsligt ella kognitivt, sum ger, at viðkomandi ikki er førur fyri at nýta talgilda loysn, borgarar við skerdum málførleikum, borgarar við ávísum sálarligum avbjóðingum ella borgari, sum ikki hevur talgildar førleikar, sum gera, at borgarin

ikki fær nýtt talgilda pallin. Ein meting skal altíð gerast um, hvørt ein borgari eigur at koma undir undantakið í stk. 2, tá hetta gerst viðkomandi.

Ásetingin heimilar ikki nýggjum gjøldum og broytir ikki verandi gjøld.

**Til § 2.**
Áseting um gildiskomu.

Uttanríkis- og fiskimálaráðið, 05. mai 2026

**Bárður á Steig Nielsen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen (sign.)

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Viðmerkingar frá Vørn
Fylgiskjal 3: Viðmerkingar frá Fiskivinnuráðnum
Fylgiskjal 4: Viðmerkingar frá P/F EFHO
Fylgiskjal 5: Viðmerkingar frá Felagnum Nótaskip
Fylgiskjal 6: Viðmerkingar frá Føroya Reiðarafelag
Fylgiskjal 7: Viðmerkingar frá P/F Líraberg